## Ólavsøkuframsýningin 2008

Ólavsøkuframsýningin 2008 er frá 28. juli til 17. august í Listaskálanum í Havn. Sýningin í ár eitur Skitsan og sýndar eru skitsur hjá listafólkum, og gongur Listafelagið við hesum nýggjar leiðir. Danska listakvinnan Kirsten Justesen hevur valt skitsur út og lagt framsýningina tilrættis, og hon fegnast um, at føroysk listafólk fegin hava latið arbeiðshøli síni upp, so hon slapp at velja skitsur, tí hon metur skitsuna vera virðismikla í arbeiðsgongdini hjá listafólkunum. 26 listafólk vísa skitsur á sýningni.




# Í lagi um Gerhard slítur

**Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag stendur fult og heilt aftanfyri Gerhard Lognberg, og velur hann at taka stuðul sín til samgonguna aftur, so er tað eisini í lagi. Og formaður felagsins metir, at kanska burdi Gerhard gjørt bart**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Gerhard Lognberg skal ein av komandi døgunum boða løgmanni frá, hvørt hann stuðlar samgonguni, eftir at løgmaður hevur svarað fyrispurningi frá Gerhardi um lagnuna hjá Sandoyartunnlinum.

Svarið var ikki júst tað, ið Gerhard Lognberg hevði vónað, og nú er spurningurin so, hvørt Gerhard ger álvara av at taka stuðul sín til samgonguna aftur.

Sandoyar Syslu Javnaðarfelag stendur aftanfyri sín tingmann, Gerhard Lognberg, í hesum málinum.

– Vit standa aftanfyri Gerhard, eisini um hann velur at taka stuðulin til samgonguna aftur, sigur William Davidsen, formaður í felagnum.

Men metir felagið, at Gerhard Lognberg átti at slitið samstarvið við samgonguna?

– Ein fær kanska onki við at stinga í sekkin, men sum hann er viðfarin, so átti hann kanska tað, metir William Davidsen.

– Vit bakka okkara mann upp. Vit hava onki fingið hendanvegin í tvey valskeið, og vit fáa eftir øllum at døma onki. Hygg bara t.d. at tunnlinum til Dals, ella at Skúvoynni. Har hava pengar verið játtaðir, men onki hendir, sigur Willam Davidsen.

Svar løgmans er ikki góður tónlekur í oyrunum á sandoyingum, men enn er tó ikki greitt, um William Davidsen ger álvara av at melda seg úr javnaðarflokkinum, sum hann annars segði fyrr í vikuni.

# Páll veit hvat hann ger

**Sandoyar Tjóðveldisfelag stendur aftanfyri sín mann, Páll á Reynatúgvu, í málinum um tunnil til Sandoynna, og forkvinnan, Meiken Krabenhøft sigur, at Páll á Reynatúgvu hevur skrivað undir, og veit hvat stendur um ætlanirnar, so hann veit hvat hann ger**



*Páll á Reynatúgvu fær stuðul frá Sandoyar Tjóðveldisfelag*

POLTIKKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Meiken Krabenhøft, forkvinna í Sandoyar Tjóðveldisfelag, sigur, at felagið bakkar Páll á Reynatúgvu upp.

Páll á Reynatúgvu hevur eftir øllum at døma ikki latið seg taka av fótum av svarinum hjá løgmanni til Gerhard Lognberg um Sandoyartunnilin, men sigur seg sum nú er halda seg til gjørdu semjuna, sum m.a. sigur, at 50 millíónir skulu setast av í 3 ár, innan meira ítøkiligt hendur, og tað tykist ikki nerva, at byrjað verður uppá Eysturoyartunnilin fyrst.

- Páll veit hvat hann ger. Hann hevur skrivað undir álitið, og veit hvat stendur í t,í og hvørjar treytirnar eru, so sum nú er taka vit undir, og felagið stuðlar, sigur forkvinnan.

Men hon ger greitt, at tekur ein nýggj støða seg upp viðvíkjandi samgongu, ella um slitið verður, so má málið takast upp av nýggjum, men sum er stendur Sandoyar Tjóðveldisfelag aftanfyri Páll á Reynatúgvu.



*John Johannesen váttar, at kreppa er í javnaðarflokkinum, men lítið ítøkiligt er at frætta innan fundirnar í samgonguni og í tingbólki javnaðarfloksins í dag*

# Politisk kreppa í javnaðarflokkinum

**John Johannesen, formaður í tingbólki javnaðarfloksins, váttar, at politisk kreppa er í flokkinum, men fyrrapartin hósdagin visti hann lítið ítøkiligt, tí fundur skuldi vera í tingbólkinum á middegi, og samgongufundur klokkan 14:00, so hann helt talan vera um eina "vacum-støðu" innan fundirnar**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

John Johannesen, tingmaður, metir tað ikki vera ábyrgdarfult, tá Sandoyar Sýslu Javnðarfelag í dag sigur seg standa fult og heilt aftanfyri tingmannin úr Sandoynni, Gerhard Lognberg, eisini um hesin tekur stuðul sín til samgonguna aftur.

John Johannesen, formaður í tingbólki javnaðarfloksins, váttar, at kreppa er í flokkinum.

Men hann sigur seg ikki kunna vera ítøkiligan,tá vit tosa við hann fyrrapart hósdag, tí á middegi skuldi fundur vera í tingbólki javnaðarfloksins, og samgongufundur klokkan 14:00, og innan hesar fundir var lítið at frætta.

Men John Johannesen váttar kreppuna í Javnaðarflokkinum, men hann helt hósdagin fyrrapart, at talan var um eina "vacum-støðu", har ongin veruliga visti nakað.

- Eg veit jú ikki enn, júst hvat Gerhard Lognberg fer at gera, leggur John Johannesen dent á.

Men um støðuna hjá Sandoyar Syslu Javnaðarfelag, ið fult út stuðlar Gerhardi Lognberg, um hesin tekur samgongustuðul sín aftur, heldur Johan Johannesen, at hetta er ikki ábyrgdarfult.

- Nú er tað fleiri ferðir lagt út, sum at tingbólkur javnaðarfloksins roynur at vera so óreinur mótvegis Sandoynni og Suðuroynni sum gjørligt. Hetta er als ikki veruleikin, men vit mugu tó taka neyðug atlit, sigur John Johannesen.

- Tað er ikki mítt borð at vita hvør er í samgongu, men eg vil vita hvussu nógvar atkvøður tingbólkurin kann koma við, sigur John Johannesen, ið ætlar at fáa tað greitt í fundi í tingbólkinum í dag, hósdag.